## Minkandi lønútgjaldingar

Síðan fjórða ársfjórðing 2008 er minni løn útgoldin í mun til sama ársfjórðing árið fyri. Tískil er tað nú 4. ársfjórðingur á rað, at minni verður útgoldið. Hetta skrivar Hagstovan á síni heimasíðu. Sagt verður, at higartil í ár eru nærum fimm milliardir krónur útgoldnar í lønum. Tað er góðar 200 milliónir krónur minni enn sama tíðarskeið í fjør.



## Pakistanar flýggja

Herurin og stjórnin í Pakistan lovaðu í juni at seta í verk umfatandi átak móti kjarnuøkjunum til Taliban og al-Qaida í fjøllunum. Fólk, sum búgva uppat økjunum, har stríð er millum partarnar, kenna seg rættiliga ótrygg og hava tikið til rýmingar. Bylgjan av Taliban-álopum hava seinastu tíðina elvt til miklan ótta fyri í landinum. Umleið 90.000 fólk eru flýdd úr økjunum og eru flutt til tryggari støð í Fera Ismail Khan og Tank. Hetta upplýsir Shaab Ali Shsh, sum er hægsti stjórnarumboðsmaður í hesum partinum av Pakistan.

# Íslendingar eru forførdir av frælsistankum

**Okkara fíggjarliga ábyrgdarloysi er kanska ein avleiðing av sjálvsprísandi nationalromantisku rørsluni í Íslandi, sum ongan enda tóktist at fáa, heldur íslendskur granskari, sum heldur fyrilestur um evnið í morgin**

FYRILESTUR

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*



*- Íslendingar sita enn fastir í eini romantiskari ímynd av sær sjálvum sum heimsins bestu, og tað ávirkar mátan, teir hava ført seg fram úti í heimi, sigur bókmentagranskarin Kristján J. Jónssin, sum heldur fyrilestur á Fróðskaparsetrinum í morgin*

Tá smartir íslendskir businessmenn, áðrenn stóru kreppuna, fóru út í heim at gera stórar íløgur, tosaðu teir ofta um seg sjálvar sum eitt slag av nýmótans víkingum. Og kanska var samanberingin ikki heilt av leið, heldur Kristján Jóhann Jónsson, docentur í íslendskum bókmentum, sum í morgin heldur fyrilestur á Fróðskaparsetrinum um romantisku rørsluna í Íslandi, við støði í tekstum hjá íslendsku tjóðskaldunum Jónas Hallgrimson (1807-1845) og Grímur Thomsen (1820-1896).

### Gamalt og nýtt frælsi

- Vit kunnu í øllum førum staðfesta, at romantiska og ofta sjálvsprísandi ímyndin av íslendingum sum eitt sterkt og frælst fólk í eini fríari náttúru, sum vit síggja tað hjá Jónas Hallgrimsson, hevur havt fastatøkur á íslendingum langt upp í 20. øld. Hetta hóast flestu aðrar europeiskar mentanir langt síðani høvdu slept slíkum nationalromantiskum frælsishugsjónum og sett liberalistiska tankan um frælsi og ábyrgd hjá tí einstaka í staðin, sigur Kristján Jóhann Jónsson.

Hann vísir á, at ein orsøkin er, at modernað liberalisma er tætt tengd at ídnaðarkollveltingini, sum ikki náddi Ísland fyrr enn í 20. øld. Tí fekk liberalistiska frælsishugtakið heldur ikki sama kjølfesti hjá íslendska fólkinum.

- Eitt sigandi dømi um hetta er, at fólk í fyrstuni tóku frástøðu frá einum yrkjara sum Grímur Thomsen og hansara liberalistisku tankum. Ikki so løgið kanska, tí hann umboðaði jú eina menning, sum íslendska samfelagið ikki hevði upplivað, minnir Jónsson á .

Hjá Grími Thomsen síggja vit eitt frælsishugtak, sum tóktist rættiliga fremmant í íslendskum høpi. Hjá honum stendur menniskjað í síðsta enda altíð einsamalt í sínum stríði óheft av náttúruni og tjóðini og hevur bara seg sjálvt at líta á, men við einum heilt nýggjum frælsi hjá tí einstaka.

- Tá íslendingar seinni tóku tankarnar hjá Thomsen til sín, hendi ein óheppin samanrenning millum eitt nationalromantiskt og eitt liberalistiskt frælsishugtak, sum ofta er endað í onkrum, sum minnir um stórlætisørskap hjá íslendska fólkinum, sigur Jónsson.

### Vantandi virðir

Sambært Jónsson hevur nationalromatiska frælsishugsjónin hjá Hallgrimsson nevniliga fest seg í tilvitskuna hjá íslendigum á ein hátt, so teir ofta eru sannførdir um, at teir eru heimsins bestu í næstan øllum. Enntá so framúrskarandi, at Ísland skjótt gjørdist ov lítið og mestsum ein forðing fyri teirra stórleika

- Trupulleikin tykist at vera, at íslendingar ikki hava tikið ábyrgdarkensluna í 1800 tals liberalismuni við í keypinum so at siga. Hetta forklárar møguliga eisini løgna mangulin uppá virðir og dømikraft í íslendska hugsunarháttinum í dag, sigur Jónsson.

- Okkurt bendir í hvussu er á, at vit mangla modernaða hugsjónina, sum eyðkendi tankarnar hjá Grími Thomsen, og sum europeiskar tjóðir hava ment gjøgnum fleiri ættarlið kring sonevnda borgaraskapið, ið ikki mentist í Íslandi fyrr enn eftir kríggið, sigur Jónsson.

Stórlæti og manglandi dømikraft er sjálvsagt ikki nakað, ið eyðkennir allar íslendingar, minnir Jónsson á. Hinvegin er lítil ivi um, at ymisháttaðu frælsishugsjónirnar hjá skaldunum Hallgrimsson og Thomsen umboða eina tvístøðu, flestu íslendingar kenna seg læstar í millum skylduna mótvegis stolta heimlandinum og ímyndina av sær sjálvum sum framfýsnir verðinsmenn.

Almenni fyrilesturin hjá Kristján Jóhann Jónsson verður í morgin klokkan 15 í Loftsstovuni á Føroyamálsdeildini.

# Jóanes Nielsen við nýggjum leiki

**Virðislønti leikhøvundurin Jóanes Nielsen roynir seg nú aftur við spildurnýggja leikinum »Aftan á Undrið«, sum verður frumsýndur á Tjóðpallinum í næstu viku**

SJÓNLEIKUR

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Hóast Jóanes Nielsen var sera virkin sum leikhøvundur í gøtusjónleiki í 70'unum, er hetta bert aðru ferð hann roynir seg sum høvund við leiki til pall. Fyrru ferð var við leikinum »Eitur nakað land Weekend?«, sum Gríma setti upp í 2001, og sum vann Norðurlendsku Dramatikaravirðislønina í 2002.

### Pinocchio kemur aftur

Í hesum nýggja leikinum roynir Jóanes aðrar leiðir. »Aftan á Undrið« flytir seg alla tíðina millum veruleika og dreym og er at kalla meira absurdur og dreymakendur.

Leikurin er um tólv ára gamla Dávid, sum hevur svull á heilanum, og skal royna at sættast við tað. Leikurin fylgir Dávidi og hansara hugsanum og dreymum um familjuna, lívið, deyðan og – Pinocchio. Í dreymunum er Dávid Pinocchio, sum ikki er ein trædukka longur, men er blivin ein ordiligur drongur. Og eins og Dávid, roynir Pinocchio at sættast við, hvat tað er at vera menniskja.

Leikurin flytur seg millum hesar báðar heimarnar, tann veruliga og dreymin, og tað er ikki altíð lætt at síggja mun á. Verur úr Pinocchio-søguni blanda seg uppí veruleikan, og hjálpa Dávidi at finna seg sjálvan í einum hurlivasa av kenslum, fantasi og dreymum.

### Royndar kreftir

Til at leikstjórna leikin hevur Tjóðpallurin fingið íslendska Guðjón Pedersen, sum í eini tjúgu ár hevur verið ein av kendastu og best umtóktu leikstjórum í Íslandi. Hann var stjóri í Borgarleikhúsinum í Reykjavík í átta ár, og hevur eisini starvast uttanlands, eitt nú í Svøríki, Finnlandi og Kekkia.

Pallmyndina stendur íslendska Elín Edda Árnadóttir fyri. Hon hevur starvast á flest øllum leikhúsum í Íslandi, sum pall- og búnasniðgevi seinastu 20 árini. Millum annað saman við Guðjón Pedersen í Svøríki, Þjóðleikhúsinum, Borgarleikhúsinum.

Spildurnýggjur tónleikur er skrivaður til leikin, og er tað Budam, ið stendur fyri tí partinum.

### Gamlir kenningar og nýggir spírar

Leikararnir í »Aftan á Undrið« eru eitt bland av gomlum kenningum og nýggjum spírum.

Kristina O. Sørensen, sum er útbúgvin á The Place og London Drama Centre og var við í Café Grugg í 2007; Durita Dahl Andreassen og Mariann Hansen leika fyri fyrstu ferð á Tjóðpallinum. Millum tey kendu andlitini eru Birita Mohr, Bárður Persson, Barbara Christophersen, Katarina Nolsøe og Hans Tórgarð.

Árni Baldvinsson stendur fyri ljósinum, Katrin Bonde ger búnar, Marjun Olsen og Drós Djurhuus standa fyri hári, sminku og maskum. Tónleikarar eru Rógvi á Rógvu og Búi Egason Dam.

Leikurin »Aftan á Undrið« verður frumsýndur á Tjóðpalli Føroya 24. oktober.



*Nýggi leikurin hjá Jóanes Nielsen flytir seg millum dreym og veruleika í spæli við søguna um Pinocchio*